

# Ivi um útlitini á Goliat-leiðini

**Jan Müller**

25.03.2014 - 10:20

Oljan.fo

Suðurkoreanar bera orð fyri at vera kvikir, men kortini bendir okkurt á, at teir verða ov seinir at lata pallin, sum skal brúkast á Goliat-leiðini í Barentshavinum. Avleiðingin verður, at eingin oljuframleiðsla verður á leiðini í ár, hóast tað alla tíðinsa hevur verið ætlanin.

Goliat-verkætlanin er longu vorðin einar sjey milliardir krónur dýrari enn ætlað, so tann seinkaða byggingin í Suðurkorea er búldur oman á sár, skrivar Offshore.no.

Tað var Hyundai Heavy Industries, sum fekk arbeiðið at byggja pallin, og Offshore.no sigur frá einari vælvitandi keldu, at fyritøkan hevur júst boðað frá, at byggingin verður seinkað seks mánaðir. Tað fer at bera í sær, at pallurin kann ikki koma upp á pláss í Barentshainum, áðrenn tíðin við ringum veðri byrjar, skrivar tíðindasíðan.

Eni er fyristøðufelag á Goliat-leiðini, og kunningarstjóri felagsins í Noregi, Andreas Wulff, avsannar tíðindini um, at pallurin er seinkaður. Tvørturímóti heldur hann uppá, at pallurin fer úr Suðurkorea í mai sum avtalað, og at frasmleiðslan á Goliat byrjar í hesum árinum.

Eni eigur 65 prosent av Goliat-leiðini. Statoil eigur hini 35 prosentini.